# Ótrúligt digitalt TILBOÐ!



## Digitalur móttakari:

2995[00] *)

*) Galdandi við stovnan av Canal Digital haldi.



Við skál og hovd kr.

3995[00] *)

*) Galdandi við stovnan av Canal Digital haldi.

OPUS
600 Saltangará
Tel 479999

CANAL DIGITAL

RADIOSERVICE
900 Vágur
Tel 37 50 00
Fart. 21 35 00

SØRVÁGS RADIOHANDIL
380 Sørvágur
Tel 33 26 14

RADIOHANDILIN
N. Finsensgøta 16
100 Tórshavn
Tel 31 82 77

GF Elektronik
Birnugøta 31
100 Tórshavn
Tel 31 02 54

AP-Radio
700 Klaksvík
Tel 45 64 50
Fart. 21 64 50
Ordramóttøka kl. 12-14

TERA
600 Saltangará
Tel 44 88 88

ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

## Starv í undirvísing og kunning

Fyri rætta fólkið er á Arbeiðseftirlitinum eitt sera áhugavert og spennandi starv í undirvísing og kunning innan arbeiðsumhvørvi og alt, ið hertil hoyrir, leyst at søkja til setan sum skjótast.

Starvið er eitt avloysarastarv í óásetta tíð, fyri starvsfólk í farloyvi.

- **Arbeiðsuppgávurnar** koma at fevna um alt okkara kunningar- og skeiðvirksemi og kann her nevnast trygdarskeið fyri fólk í trygdarskipanum á virkjum, temadagar og førleikaskeið fyri trukk- og kranførarar v.m. Eisini verður talan um at kunna og leiðbeina virkir, skúlar o.o., um galdandi lóggávu innan arbeiðsumhvørvi.
  Hertil skal viðkomandi standa fyri útgávuni av okkara kunningarblaði »Trygd & Trivni«.
- **Rætti umsøkjarin** við royndum innan undirvísing og frálæru, tøkniligum førleika, við góðum evnum til at málbera seg skrivliga og munnliga á føroyskum og við teldukunnleika í Word, Excel, Access, PowerPoint v.m., hevur fyrimun.
- **Setanartreytir.** Løn og setarartreytir sambært sáttmála millum Landsstýri og viðkomandi yrkisfelag. Lønin verður avtalað og góðkend áðrenn arbeiði byrjar.
- **Upplýsing og umsókn.** Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Karl Joensen, tlf. 317811. Starvið skal setast skjótast gjørligt.

Skrivlig umsókn til starvi, merkt »Undirvísari«, við avriti av prógvi og møguligum ummælum skal, áðrenn 15. november 2001, sendast til:

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**
P.O.Boks 1134
FO-110 Tórshavn

### Eitt sindur um Arbeiðsumhvørvislógina

**Kapittul 1**
***Endamál og øki***
**§ 1.** Endamálið við lógini er, at

1. virka fyri einum tryggum og heilsugóðum arbeiðsumhvørvi, sum altíð er í samljóði við teknisku og sosialu gongdina í samfelagnum,
2. skapa grundarlag fyri, at virkini sjálvi kunnu loysa sínar trygdar- og heilsuspurningar eftir vegleiðing og í samstarvi við feløgini á arbeiðsmarknaðinum og við vegleiðing og undir eftirliti av Arbeiðseftirlitinum.

**Kapittul 12**
***Arbeiðseftirlitið***
**§ 54.** Uppgávurnar hjá Arbeiðseftirlitinum eru, í spurningum um arbeiðsumhvørvi, at:

1. vegleiða virkjunum, pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og almenninginum í spurningum, ið hava arbeiðsumhvørvisligan týdning,
2. hjálpa landsstýrismanninum við fyrireikingunum av reglunum sbrt. lógini,
3. áseta nærri fyriskipanir við heimild frá landsstýrismanninum,
4. kunna seg um teknisku og sosialu menningina í samfelagnum við atliti til at betra um arbeiðið, hvat trygd og heilsu í arbeiðsumhvørvinum viðvíkur,
5. viðgera ætlanir til framleiðsluhættir, arbeiðspláss, tøknilig hjálpartól v.m., evni og tilfar og geva loyvi, sum eru í samsvari við lógina ella fyrisitingarligar reglur,
6. ansa eftir, at lógin og tær fyrisetingar, sum verða






# SøluRásin 2001 á Skála

## Leygardagin 3. november

| | |
|---|---|
| Kl. 15.00 | SøluRásin 2001 letur upp |
| Kl. 15.45 | Asbjørn Mikkelsen setur stevnuna |
| Kl. 16.00 | Klovnar sum ganda og búktalari |
| Kl. 18.00 | Mótasýning |
| Kl. 18.30 | Gandakallur og búktalari |
| Kl. 20.00 | Mótasýning |
| Kl. 21.00 | Ragnar í Vík syngur á pallinum |
| Kl. 21.30 | Drigið verður millum seldu atgongumerkini |
| Kl. 22.00 | Stevnan letur aftur |

## Sunnudagin 4. november

| | |
|---|---|
| Kl. 15.00 | SøluRásin 2001 letur upp |
| Kl. 16.00 | Eg eri ein "K" – barnakór |
| Kl. 17.00 | Mótasýning |
| Kl. 17.30 | Vørutombola í bygdasalinum |
| Kl. 19.00 | Ragnar í Vík syngur á pallinum |
| Kl. 20.00 | Mótasýning |
| Kl. 21.00 | Jónsvein og Birgir syngja á pallinum |
| Kl. 21.30 | Drigið verður millum seldu atgongumerkini |
| Kl. 21.45 | SøluRásin 2001 letur aftur |

## Leiðari søkist

Vit sóknast eftir leiðara til handil okkara at byrja skjótast tilber.

Má vera útbúgvin innan keypmansyrkið, vera røkin, álítandi, hava góð samstarvsevni og má kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Góð løn verður latin!

Skrivlig umsókn við avritum av lærubrævi og evt. viðmælum verður at senda til

**BAKARÍIÐ Mylnan**
Postboks 3334
FO-110 Tórshavn

í seinasta lagi 8. nov. 2001.

Um nærri upplýsingar ynskjast kann ringjast til Per Poulsen, tlf. 314456 – 214456.

## Starv hjá Føroya Skúlabókagrunni

Fyri eitt av starvsfólkum okkara, sum er í farloyvi, verður avloysarastarv í Føroya Skúlabókagrunni lýst til setanar frá 1. januar 2002 til 1. august 2004.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, ráðgeving og vegleiðing í sambandi við at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðlar til føroyska skúlaverkið. Ein partur í starvinum verður at kunna seg við tørvin á tíðarbærum undirvísingarmiðlum, lærugreinum og undirvísingarevnum, eina helst í fólkaskúlanum, eisini í teld og teldutøkum útgávum. Uppløring kann verða neyðug.

Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir, dyggur fakligur førleiki, hollur kunnleiki í føroyskum og kunnleiki í teld.

Løn og setanartreytir eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálastýrisins.

Royndartíðin er eitt ár.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera skúlabókanevndini í hendi ikki seinni enn 19. november 2001.

Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá skrivaranum í skúlabókanevndini, Heðini M. Klein, telefon 316100.

Tórshavn, 25. oktober 2001.

Føroya Skúlabókagrunnur
Skúlabókanevndin
Lützenstrøð 4 · FO-100 Tórshavn
Telefon 316100

Sosialurin 311820

## Nýggjar TANNPROTESUR

Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

ROTTANGAR




**pf Maria Poulsen**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

Sosialurin 311820




www.sosialurin.fo